

## Nokia kemur við farteldu

Nokia fer nú inn á tann støðugt vaksandi marknaðin fyri smáar farteldur, tær sokallaðu netbooks. Hetta er eitt heilt nýtt øki fyri Nokia. Nokia kallar sína netbook »Booklet 3G«, og sum navnið avdúkar verður tað við innbygdum 3G tráðleysum internetsambandi. Harafturat fær Booklet 3G óvanliga langa livitíð á battaríunum – heilar 12 tímar. Eisini á øðrum økjum verða eginleikarnir betri enn hjá flestu kappingarneytunum. Eitt nú verður innbygdur GPS og forritið Nokia Maps í Booklet 3G, eins og bæði tráðleyst Bluetooth radiosamband, SD-kortlesari, WiFi internetsamband við meira. Harumframt verður eisini HDMI-videoútgangur til HD-video, sum bendir á, at tað verður eitt sterkari videokort ella prosessari í hjá Nokia enn hjá kappingarneytunum. Stýrisskipanin er Windows, prosessarin er Intel Atom og skermurin er 10 tummar og í HD upploysn. Uttaná er Booklet 3G klødd við aluminium, og samlaða vektin er 1,25 kilo. Nær og til hvønn prís Booklet 3G kemur á gøturnar, verður avdúkað á Nokia World messuni í Stuttgart tann 2. September.

# Alt at siga fyri Føroyar

**- Sjómannadagurin er ikki bara týdningarmikil fyri Klaksvíkina, men fyri allar Føroyar, sigur varaborgarstjórin í Klaksvíkar kommunu**

SJÓMANNADAGUR
*Óla Jákup Jacobsen*

Ein av teimum, sum hevði leitað sær oman á sjómannadagin í góðveðrinum, var ungi varaborgarstjórin í Klaksvík, Jógvan Skorheim.

- Sjómannadagurin er sera týdningarmikil fyri Klaksvíkina. Ja, satt at siga hevur hann alt at siga. Klaksvíkin er jú kend fyrst og fremst sum ein fiskivinnubýur, og tað er gott, at man kann fokusera uppá tað, sum ein er góður til, sigur Jógvan Skorheim.

Og hann er skjótur at leggja aftrat:

- Eg vil siga, at dagurin er ikki bara týdningarmikil fyri Klaksvíkina, men fyri allar Føroyar, tí fiskur er nærum okkara einasta útflutningsvøra.

### At hitta fólk

Eitt, sum Jógvan Skorheim sær nógv fram til á sjómannadegnum, er at hitta fólk.

- Hóast mær dámar alt tiltakið sera væl, so gleði eg meg tó allarmest til morgunmatarborðið og tær stóru kappingarnar, tí har hevur ein møguleika at hitta nógv fólk. Tað er sera stuttligt at síggja øll hesi fólkini innan fiskivinnuna, alt frá dekkarum til akademikarar, sigur ungi varaborgarstjórin.



*- Tað er sera stuttligt at síggja øll hesi fólkini innan fiskivinnuna – alt frá dekkarum til akademikarar, sigur Jógvan Skorheim, varaborgarstjóri í Klaksvíkar kommunu*

# 2000 ókeypis ísar

SJÓMANNADAGUR
*Óla Jákup Jacobsen*

Eitt av teimum heldur leskiligari tilboðunum á sjómannadegnum var í egningarskúrunum á Stongunum. Har stóðu Leivur Vitalis Hansen og Beinta Gregersen og gjørdu soft-ice.

- Vit hava úr at gera, sigur Leivur, meðan hann fyllir soft-ice upp í vaflur.

- Her hava verið ótrúliga nógv fólk, og ísarnir ganga sum heitt breyð. Tað er kanska ikki so løgið, tá ísarnir eru ókeypis, skoytir Beinta skemtandi uppí.

- Vit hava givið ísar út nú non-stop í yvir tríggjar tímar, og vit vænta ikki at kunna halda frí enn á sinni, sigur Leivur og væntar at koma til at gera einar 2000 ísar tilsamans.

Klaksvíkar kommuna hevur heitt á ymisk feløg at skipa fyri ymiskum.

- Kommunan heitti á okkum í ungdómshúsinum um at gera soft-ice, og tað vildu vit sjálvsagt ógvuliga fegin, sigur Beinta Gregersen, sum er leiðari fyri ungdómshúsinum, sum eisini verður rópt Húsið.



*Leivur Vitalis gevur einum dreingi ein ís*



*12 ára gamla, Ólavi Klein Lydersen, dámdi sera væl vatnkríggið*

# "Vatnkríggið nógv tað besta"

**So avgjørdur er 12 ára gamli Ólavur Klein Lydersen, tá hann verður spurdur um, hvat er stuttligast á sjómannadegnum**

SJÓMANNADAGUR
*Óla Jákup Jacobsen*

- Her er nógv stuttligt at fara til, men vatnkríggið í bátunum var alvorliga gott. Tað lógu ein rúgva av smábátum á kaiini, og man fór bara uppí onkran bát. Í bátinum, sum eg var við, vóru eini 8 børn og eini 10 vaksin, sigur Ólavur Klein Lydersen.

Hann sigur, at hetta var í besta sjónrænarastíli, har allir bátarnir bardust móti hvørjum øðrum.

- Á takinum sat eisini ein maður og spældi uppá ein trummu, so tað veruliga kom ein krígsstemningur í. So, onkuntíð snikti man seg inn á ein bát og gjørdi eitt ordiligt álop við vatnspularum og vatnballónum," sigur Ólavur smílandi, meðan hann leggur aftrat, at tað aðrar tíðir vóru bátar, sum sníktu seg inn á teirra bát og gjørdu tað sama.

Hann sigur, at tað allarbesta var, tá hann tók eina vatnballón, siktaði og rakti ein mann beint á høvdið.

### Einki var turt

- Á landi stóðu nakrir menn og spulaðu við tjúkkum brandslangum, og einaferð meðan eg vendi rygg til, bleiv eg spulaður mitt á ryggin. Trýstið var so kraftigt, at eg eina lítla løtu misti balansuna og fór nøkur fet fram. Men eg fekk tó hildið mær á fótum, leggur Ólavur aftrat.

Hann sigur, at tá vatnkríggið var liðugt, var hann so rennvátur.

- Har var ikki eitt turt stað eftir á kroppinum. Men tað bilti ikki so nógv, tí tað kundi mamma taka sær av, tá eg kom heim, sigur Ólavur Klein Lydersen flennandi.